## VIÐMERKINGAR

## DAGSINS MEINING

### Fullkomin vend í Føroyapolitikkinum hjá donsku stjórnini?

Tað verður lagt út sum, at fullkomin vend er komin í Føroyapolitikkin hjá donsku stjórnini, tá Landsstýrið er sloppið at yvirtaka nøkur málsøki undir vinnumálum, ið ikki eru nevnd í Heimastýrislógini.

Hvat er nýtt við hesum? Hava danskarar nakrantíð forðað føroyingum at yvirtikið nakað? Var undirgrundarmálið ikki yvirtikið, hóast tað heldur ikki stendur sum málsøki í Heimastýrislógini?

Nú er tað soleiðis, at hendan samgongan hevur ikki nógv at samanbera við, tí teir hava so at siga einki yvirtikið í hesum valskeiðnum. Vit føroyingar kunnu yvirtaka sum vit vilja. Hetta er eisini tað, ið andstøðan allatíðina hevur ført fram.

Teir einastu, sum hava ivast í, at vit føroyingar kunnu yvirtaka, sum vit vilja, eru tjóðveldismenn. Tað má sigast at vera ótrúligt, at føroyingar sjálvir ganga og sáa iva um vit kunnu yvirtaka mál ella ikki. Líka ótrúligt er tað, tá somu menn alment ganga og sáa iva um virðið av framdum yvirtøkum, soleiðis sum Tjóðveldisflokkurin hevur gjørt við undirgrundarmálinum. Ein freistast til at spyrja, hví hesir menn yvirhøvur vilja yvirtaka nakað undir Heimastýrislógini, tá vit nú sambært teimum sjálvum ikki hava rætt til nakað sum helst uttan fullveldi.

Tað einasta, sum er broytt í viðurskiftunum millum Føroyar og Danmark er, at vit sum eina broyting hava fingið ein høviskan statsministara, sum ber fram sín boðskap við einum smíli. Innihaldið er tað sama.

Tjóðveldisflokkurin gongur sjalvur og uppfinnur trupulleikar, uttan hald í veruleikanum. Tá so tað verður prógvað, at vit føroyingar kunnu yvirtaka sum vit vilja, so proklamera hesir menn tað sum sjeymílafet og sum um, at fullkomin vend er komin í. Veruleikin er, at einki nýtt er hent, og vísir seinasta gongdin viðvíkjandi yvirtøkum meira enn nakað annað, hvussu sitandi samgonga hevur spilt tíðina í meiningsleysari konfrontatión fyrstu 3 árini av valskeiðnum, heldur enn at lurta eftir andstøðuni.

**Sosialurin**

# Ongin lógarbroyting um exit-poll

**Høgni Hoydal**



Síggi, at fleiri nú skriva um, at broytingar skulu gerast í vallógini til tess at banna “exit-poll-kanningum” í valhølunum.

Ikki so løgið kanska, tí fleiri fjølmiðlar hava borið tey tíðindi.

Men hesi tíðindi eru ikki røtt. Helst er misskiljingin komin í, longu tá tíðindi vórðu borin um svarið upp á tvær kærur, ið vórðu sendar um exit-poll-kanningina í Ítróttarhøllini á Nabb í Havn á fólkatingsvalinum.

Tá varð sagt, at kærurnar fingu ikki viðhald. Men tað fingu tær.

Í svarinum upp á kærurnar verður nevniliga staðfest, at henda kanning ikki var í samsvari við reglurnar, tí hon fór fram inni í valhølunum. Tað er sjálvandi loyvt at gera exit-poll-kanningar – men ikki inni í valhølunum.

Broytingar í vallógini hava sostatt onki við hetta mál at gera.

Broytingarnar í vallógini snúgva seg um:

- at geva blindum og sjónveikum møguleika at velja sær sítt egna hjálparfólk, tá tey atkvøða.
- at lata valhølini verða opin uttan steðg frá kl. 10 á morgni til kl. 20 á kvøldi.
- at geva valstýrunum greiðari heimildir til sjálvi at skipa fyri á valstaðnum.

# Nú pellar Høgni aftur!

**Thomas Arabo**



Tað er eingin, ið nýtist at fremja karaktermorð á Høgna Hoydal og Torbjørn Jacobsen. Málið um Signar á Brúnni og ein bandupptakari á Sosialinum hava til fulnar avdúkað muruna í hesum báðum garpunum.

Thomas Arabo hevur ikki lagt øll Tjóðveldisfólk undir at lúgva, og er tað sostatt ósatt, tá Høgni sigur hetta. Onkur í Tjóðveldisflokkinum hevur logið fyri Signar á Brúnni, og hevur Torbjørn Jacobsen logið alment. Eg spurdi í mínari grein, um ”lygnin var góðkent amboð hjá útvaldum tjóðveldismonnum”. Nær útvald er blivið til øll veit eg ikki, men tað er í besta fall citatfusk hjá Høgna Hoydal. Tjóðveldisfólk munnu verða heiðursfólk, sum fólk flest nú einaferð eru í hesum landinum.

Annars er nokkso skemtiligt at síggja, at Høgni Hoydal kritiserar Sambandsflokkin fyri at taka setningar burturúr samanhangi. Tað má vera sum við sótpottinum, ið ákærdi ketilin fyri at vera svartan.

# Fyritíðarpensjonistar verða ov hart skattaðir

**Marjus Dam**
*løgtingsmaður*



Avlamispensionistar okkar verða alt ov hart skattaðir

Fyritíðarpensionistar okkara, sum flestir hava ein rest arbeiðsførleika at nýta, verða av myndugleikum okkara beinleiðis hildnir fyri spott. Tá skattafría markið er náa, so missa teir viðbótina, svarandi til 60 % av hvørjari krónu. T.v.s. at um teir nýta rest arbeiðsførleika sín til arbeiði, so missa teir í fyrsta lagi 600 krónur fyri hvørjar túsund krónur. Síðan verður inntøkan skattað afturat. T.v.s. at hesin lágintøkubólkur, ið vit vita at talan er um, helst kemur at gjalda eini 70-80 % í landskassan av eini sera lágari inntøku - ið haraftturat er ein inntøka, ið er sera neyðug hjá mongum, júst í hesum bólki. Ikki kann tað sigast at verða stimbrandi fyri nakran, ið hevur hug at arbeiða. Men allarmest er tað ein skomm fyri okkara land, at hesi fólk verða viðurfarin á slíkan hátt.

Hetta má broytast og gerast meira rættvíst. Tað høvdu allir partar kunna liva væl við.


Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Anja Weihe anja@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.




## VIÐMERKINGAR

# Alt á borðið um Jóannes og Old

**Jógvan Arge**



Tað ljóðar, sum Jóannes Eidesgaard og Henrik Old halda seg vera meir enn fólk flest.

Tí kunna teir búgva í Havn, men gjalda skatt á bygd.

Eftir skrivingini at døma halda teir seg sum løgtingsmenn ikki koma undir somu reglur, sum onnur, ið eiga at gjalda skatt eftir, hvar húski teirra býr.

Møguliga kenna teir á sær, at tað er ov løggut av teimum ikki gjalda skatt til ta kommununa, sum teir hava sítt politiska grundfesti í.

Men er hetta eitt val, sum teir ráða fyri sjálvir?

Nú hava vit hoyrt, hvat Jan Christiansen sigur. Hann ivast ikki í, at teir av røttum eru skattaborgarar í Havn.

Vit hava eisini hoyrt teir báðar Finnleif Guttesen og Jógvan Krosslá. Teir vilja ikki av við pengarnar, sum teirra kommunur hava fingið hvønn mánaða í áravís.

Vit hava somuleiðis hoyrt, at Jóannes er til reiðar at fara í rættin og løgtingið við málinum, og Henrik boðar frá, at hann framvegis vil verða tann bøfressur, sum hann er.

Nú er eftir er at fáa úrskurð frá teimum, sum umsita skattalógir landsins.

Toll- og Skattstova Føroya - ella hvør tað nú er, sum hevur best skil á hesum - eigur sum skjótast at koma út á vøllin og siga okkum, hvat er rætt og hvat er skeivt í hesum máli.

Hvørki skattamyndugleikar, kommunur ella løgtingsmenn kunna vera bekentir við ta óvissu og togtogan, sum nú bleiv um skattakrónurnar hjá tveimum løgtingsmonnum.

# Finnst tað yvirhøvur nakar vilji at fáa loyst bústaðartrupulleikan?

**Fríðálvur Jensen**
*valevni Sambandsfloksins í suðurstreymi*



Tá eg sat og lurtaði eftir Fimmaranum herfyri, má eg siga, at tað tóktist at tað ikki er stórvegis áhugi at fáa gjørt nakað munagott, soleiðis at tað skal gerast møguligt hjá yngri og eldri at fáa eina íbúð at búgva í.

Tó bendi kjakið á, at nú skal tað politiska telvaríið ígongd, nú tað stundar til val, og er tað ikki eiti á hvat nú skal gerast, men eg eri stórliga bangin fyri, at vit enn einaferð eru vitni til tað bera valflesk.

Eisini til seinasta býráðsval var tað ikki eiti á, hvat skuldi gerast, men má tað staðfestast at ONKI er hent – bert orð og ongar íbúðir.

**Hvat skal til**

Tað er neyðugt at nýtt fólk kemur til, sum kann leggja ein miðvísan bústaðurpolitikk tilrættis, og at tað út frá hesum, verður løgd ein ætlan, sum ger bústaðarmarknaðin meira nøktandi.

Vit kunnu síðani kjakast um hvønn leiklut tað almenna skal hava, og er tað mín mening, at tað skal veitast stuðul til leiguna, soleiðis at hetta kann setast í mun til rentustustuðulin, sum verður veittur til tey, sum hava bygt sær ein sethús.

Fyri at leggja upp fyri byggikostnaðinum, er tað kanska rætt at hyggja uppá MVG´ið soleiðis at byggingin kann gerast bíligari, men er tað sjálvandi neyðugt at seta greiðar reglar fyri, hvussu hetta skal gerast, soleiðis at byggiprísurin og leigukostnaðurin kunnu haldast á einum støði, sum ger tað møguligt hjá einstaka at festa sær búgv.

**Íbúðarblokkar**

Vit mugu tora at fara undir nakað munagott, og er tað mín meining, at tað skulu byggjast blokkar við t.d. 50 íbúðum í hvørjum, og so er tað upp til t.d. byggifeløg og/ella sjálvsognarstovnar at gera av, hvussu hetta byggjaríið verður skipað.

Tá hugt verður at byggjaríum uttanlanda, er tað góður møguleiki fyri at fáa snøgt byggjarí burtúr blokkbygging.

Trýstið á bústaðartrupulleikan er nú so stórt, at nú SKAL okkurt munagott gerast, og tí skal nýhugsan og nýggjar kreftir framat.

# Kurl@ — fyrimyndin fyri aðrar barnagarðar

**Elin Lindenskov**
*býráðslimur í Havn*



Stutt eftir at Dagstovnalógin var samtykt, vendi Føroya Tele sær til Tórshavnar kommunu við fyrisurningi um at seta á stovn egnan barnagarð. Tí sambært Dagstovnalógini frá 10.05.2000, kann kommunan loyva øðrum, t.d. fyritøkum og stovnum, at stovnseta egnan dagstovn treytað av, at allar ásetingar í lógini verða fylgdar.

Tórshavnar kommuna og Føroya Tele fóru í samráðingar um at gera ein barnagarð til starvsfólkið hjá fyritøkuni. Úrslitið bleiv, at Føroya Tele rindaði 80% og kommunan 20% av íløguni. Raksturin gjalda Kommunan 70% og foreldurini 30% á sama hátt sum allir aðrir dagstovnar. Partarnir samdust eisini um, at um so er, at yvirskotspláss eru á stovunium, so skal tey latast børnum á kommunala bíðilistanum.

Fyri Tórshavnar kommunu var tað sera umráðandi, tá sáttmálin kundi brúkast sum fyrimynd, um onnur feløg ella stovnar komu við umsókn, um at stovnseta egnan barnagarð.

Ynskið um ein barnagarð til Landssjúkrahúsið er gamalt, tað var frammi í 60 árunum og hevur síðani ofta verið frammi í kjakinum um vantandi barnaansing í Havn. Nú, vit hava fingið dagstovnalóg ina, sum greitt ásetir, at barnagarðsøkið er kommunalt mál burturav, byrjar norðoyartingmaður at taka trupulleikan í álvara. Ikki tí hann vil loysa nakran barnaansingartrupulleika, men tí hann vil ikki hava, at landið skal gjalda fyri tænastu í Havn.

Tað er sera harmuligt, at tingmaðurin velur at leypa á Havnina, heldur enn at viðgera spurningin um barnagarð til Landssjúkrahúsið. Ein barnagarður til Landssjúkrahúsið kann verða fyrimynd fyri alt landið. Enn betur, um tingmaðurin valdi at luttaka í kjakinum um eina varðandi loysn á barnaansing, sum heild. T.d. við einum uppskoti um at broyta dagstovnlógina soleiðis, at barnaansingartrygd bleiv eitt krav til kommunurnar.

So leingi vit ikki hava tryggjað øllum børnum mennandi dagstovnapláss, arbeiða kommunurnar eftrir Dagstovnalógini. Lógini, sum loyvir kommunum at lata fyritøkur og stovnar gera sínar egnu barnagarðar. Lógin sigur einki um, hvussu slíkur stovnur skal fíggjast, tí hevur Tórshavnar kommuna gjørt sáttmála við Føroya Tele um barnagarð. Ein sáttmála, sum fyri Tórshavnar kommunu vil verða grundarlagið og fyrimyndin, um aðrar fyritøkur ella stovnar hava líka bæriligar ætlanir um at stovnseta barnagarð, sum Føroya Tele.

# Børnini — Føroya framtíð

**Reimund Langgaard**
*valevni Sambandfloksins í Eysturoynni*



Hvussu verður lærdómur barnsins raðfestur í Føroyum í dag? Sambandsflokkurin sigur greitt í síni stevnuskrá, at útbúgvingarskipanin eigur at verða løgd soleiðis til rættis, at føroyingar fáa best møguliga útbúgving á øllum økjum. Her verður hugsa um bæði barnaskúlan, framhaldsdeildina og víðari útbúgvingar.

Eg meini persónliga, at vit hava eina hampuliga góða skúlaskipan í Føroyum. Sum læraralesandi síggi eg tó, at tað eru sera nógv børn, sum ikki fáa tad frálæru teimum tørvar. Grundin til hetta er fyrst og fremst, at fólkaskúlin ikki fær nógvan pening játtaðan. Tann ov lítla játtanin hevur við sær at

- nógvir skúlaflokkar í landinum eru alt ov stórir — onkrir hava næstan 30 næmingar. Hetta førir við sær, at hvør næmingar ikki fær ta tíð, id krevst fyri at kunna fáa sum mest burturúr.
- skúlarnir fáa alt ov fáar tímar tillutaðar til næmingar við serligum tørvi. Hetta gongur fyrst og fremt útyvir teir næmingar, sum ikki hava lætt við at læra. Eisini gongur hetta í onkrum førum útyvir restina av flokkinum, av tí at lærarin má brúka meira tíð uppá næmingarnar við serligum tørvi.
- Skúlarnir hava ikki nóg mikið av tímum, til at kunna nøkta tann tørv, sum føroyska fólkaskúlaskipanin krevur. Vit hava mangan hoyrt í fjølmiðlunum, at skúlar verða noyddir at skerja tímatalvuna hjá næmingunum, av tí at teir ikki hava pening til teir kravdu tímarnar. Dømi um hetta er tá Vestmanna skúli valdi at skera burt Føroyskt, rokning og kristni heldur enn evning, tónleik og ítrótt, sum hesar sparingar vanliga ganga útyvir.
- Umstøðurnar hjá skúlunum eru alt ov vánaligar. Flestu skúlastovurnar í landinum uppfylla als ikki landsins reglugerðir, tá talan eru um er um støðd, inniluft, útsúgving, innbúgv v.m. Flestu skúlarnir hava heldur ikki nóg mikið av peningi til bøkur og annað lærutilfar.

Tað er stór skomm og stórt spell at peningur skal vera grundin til, at okkara ungu fáa ikki nøktandi lærdóm tey árini tey nýta í tí føroysku skúlaskipanini. Eg meini, at vit mugu raðfesta skúlan nógv hægri enn vit gera í løtuni. Tað er jú har okkara børn og ungu nema tann lærdóm, sum tey skulu nýta restina av lívinum. Tað er eisini har okkara komandi starvsfólk verða fyrireikað til sína starvstíð.

Tað hevur mangan verði sagt um sunnudagsskúlan, at um Føroyar ynskja at verða avkristnaðar, so skal eingin sunnudagsskúli verða í eitt ættarlið. Eg trúgvi, at tað liggur stórur sannleiki í hesum og trúgvi eg, at hetta eisini eisini kann verða sagt um skúlan. Ynskja vit at minka um vitanini hjá føroya fólki, skulu vit bert forsøma okkara fólkaskúla í nøkur ár.